# VB ætlar sær allan vegin í ár




*Uttan góðar stuðlar gerst onki. Í meiri enn 30 ár hevur Suðuroyar Sparikassi verið hollur stuðul hjá VB og tað er hann framvegis. Her skriva Per Jacobsen, marknaðarleiðari í Suðuroyar Sparikassa, høgrumegin og John Henrik Holm, formaður í VB, undir stuðulssáttmála. Spælararnir, sum hyggja at, eru, frá vinstru, Birni Kjærbech, Margreth Augustinnussen, Jón Gærdbo, Bjarni Johansen liðskipari á fótbóltsliðnum, Gurið Mortensen, liðskipari á hondbóltsliðnum og Birgir Jørgensen*

**Við góðum leikarum, nýggjum vølli og dyggum stuðuli sær gott út hjá Vágs Bóltfelag í ár, bæði í fótbólti og í hondbólti. Í dag skulu hondbóltskvinnurnar upp til eina avgerandi roynd, tá ið tær tørna saman við stjørnuni í steypafinaluni í Havn**

STUÐULSAVTALA
*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Vágbingar ætla sær allan vegin í ár.

At hondbóltsliðið hjá kvinnunnum í Vági skarar framúr, vita tey sum fylgja við.

Men eisini í fótbólti ætlar VB sær langt í ár.

Men ongin kemur sovandi til eitt gott úrslit. So tað skal arbeiðast hart.

Og tað er heldur ikki ókeypis. so tað er eisini brúk fyri góðum, fíggjarligum stuðuli.

Og tað hevur VB.

Aftur í ár verður tað lokali peningastovnurin, Suðuroyar Sparikassi, sum verður høvuðsstuðul hjá VB.

Og tað hevur Suðuroyar Sparikassi verið í so nógv ár nú, at tá ið Per Jacobsen, marknaðarleiðari í sparikassanum setti undirskriftina á stuðulssáttmálan, helt hann fyri at Suðuroyar Sparikassi og VB eru makkarar. Har tú sært VB, sært tú eisini Suðuroyar Sparikassa.

Tað skerst heldur ikki burtur, at VB hevur verið einkarbarnið hjá Suðuroyar Sparikassa, tí nógv tað mesta av tí, sum peningastovunirin hevur sett av til slík tiltøk, fer til bóltfelagið í Vági.

Tað var á eini lítlari samkomu í VB húsinum mikukvøldið, at VB og Suðuroyar Sparikassi skrivaðu undir nýggja stuðulsavtalu.

Og formaðurin í VB, John Henrik Holm, kundi ikki annað enn vera samdur við marknaðarleiðaran í sparikassanum.

Og hann duldi heldur ikki fyri, hvussu ómetaliga stóran týdning hetta samstarvið við Suðuroyar Sparikassa hevur fyri Vágs Bóltfelag, tí kappingin harðnar fyri hvørt ár, og fyri at gera seg galdandi, krevur tað meiri og meiri, eisini fíggjarliga.

### Hava koyrt á

Og galdandi - tað ætlar VB at gera seg í ár.

Hans Nielsen, sum er venjari, hevur koyrt á spælararnar tað mesta av árinum og hann heldur at spælarahópurin er góður.

Allir heimligu spælararnir, sum vóru í fjør, eru tøkir aftur. Men eisini gamlir revar, sum Jón Pauli Olsen hava vant dugliga í ár.

Men harafturat hevur VB fingið evnagóða landsliðspælaran, Sìmun Samuelsen aftur á liðið, eftir at hann hevur verið í Gøtu ein steðg.

– Harafturat hava tey yngri liðini staðið seg ógvuliga væl og hava verið føroyameistarar í fleiri ár á rað og fleiri av teimum spælaranum eru eisini so smátt við at vera búnir til 1. deild.

Somuleiðis hevur VB eisini onkrar útlendingar við á liðnum. Milan Kulic er kendur, men serliga spentir eru teir uppá tveir litavar, sum eru komnir til Vágs at spæla í ár.

Tann 28 ára gamli Dalius Staleliunas er royndur verjuspælari. Men ikki minst eru vagbingar spentir upp á 22 ára gamla áleypparan, Mindaugas Grigalevicius, sum eisini er komin á litaviska landsliðið.

– Hópurin í ár er tann frægasti í nógv ár, bæði í tali og í dygd, sigur Hans Nielsen

Og venjarin sigur, at VB avgjørt fer eftir meistaraheitinum í ár, hóast hann veit, at kappingin er hørð.

– Vit fara altíð eftir meistaraskapinum. Men avgjørda minstakravið er eitt pláss í Evropa komandi ár, leggur hann afturat.

Og tað er ein gulrót, sum VB sær fram ímóti, serliga nú felagið fyllir 100 ár komandi ár...

### Steypafinala í dag

Fótbóltur er eitt. men í hesum døgum er tað eina og aleina hondbóltur, tað snýr seg um í Vági.

Í dag skulu VB- kvinnurnar royna seg í steypafinaluni ímóti Stjørnuni og vágbingar fara mannsterkir til Havnar at eggja sínum spælarum at geva alt tær eiga og nakað væl afturat.

Steypafinalur eru altíð nakað serligar, men vágbingar hava nakað av hava góðar vónir í, tí seinasta sunnudag hittust bæði liðini í landskappingini og tá lá Stjørnan víðopin eftirá.



*Í dag er tað bara hondbóltur tað snýr seg um í Vági. Í dag skal kvinnuliðið í hondbólti royna seg í steypafinaluni ímóti Stjørnuni og Vágbingar fara mannsterkir til Havnar at koyra á sínar spælarar. Aftara rað frá vinstru eru tær Eyðbritt Mortensen, Eyðdis Kjærbo, Gurið Mortensen, liðskipari, Daiva Toumaite og Ruth Lisberg og Anna Djurhuus. Fremra rað frá vinstru húka Aivaras Daugas, venjari, Margreth Augustinussen, Asta Armonaviciute, Aukse Visniauskaite og Jakoba Poulsen.*
*Gurðun í Lágabø, Rannvá Augustinussen, Leila Jespersen, eru ikki við á myndini*



# Grýludansurin á Kambsdali 13 ár



GRÝLUDANSUR
*Tíðindaskriv*

Fyri 13. ferð skipar dansifelagið »Kom og Dansa« fyri grýludansi á Kambsdali føstulávintsleygarkvøld.

Og til dansin í ár fara teir vælumtóktu »All That Rain« at spæla.

Fyrireikarnir siga, at teir hava roynt at gera tiltakið meir fjølbroytt enn vanlig dansitiltøk flest, og hevur nógv forvitnisligt verið á skránni hesi árini.

Eisini hevur høllin verið pyntað við ljósperum og ballónum hvørt ár.

Øll árini hevur dansurin verið í ítróttarhøllini á Kambsdali. Sigast kann at hetta er vorðin ein verulig tradition, og hava nógv fólk verið til dansin hvørt ár. Mest úr Eysturoynni, men nógv eru eisini komin aðrastaðni frá.

Nú er eisini góður møguleiki hjá vágafólki at koma til tiltaki.

Og mong av teimum sum koma hava nýtt møguleikan at lata seg í grýluklæðir. Ein hevur týðuliga sæð, at nógv av teimum hava brúkt nógva tíð at seyma og annars gera sær eina drakt.

Fyri at gera tað meira áhugavert og spennandi at gera góð og orginal grýluklæði, hevur tað á hvørjun ári verið vinningar til bestu grýluna, og í ár er ætlanin at gera nakað serligt burturúr.

Besta grýlan vinnur eina uttanlandsferð fyri 2.

Nr 2 og 3 fáa eisini vinning.

Nevnast kann at grýluklæðini skulu vera heimagjørd fyri at koma uppí part, tá dømast skal.

Ikki tí, keypt grýluklæðir eru eisini meir enn vælkomin, men tað verður ikki hildið at verið rætt, at ein sum fer inn í ein handil og keypir sær ein drakt, skal vinna yvir einum, sum hevur sitið og hevur nýtt hendur og hugflog og nógva tíð til arbeiðið.

Bussar koyra frá Vágum og Vestmanna og Tórshavn, eins og bussar koyra av Strondum og Toftum kl. 23.30 á vegnum verður koyrt gjøgnum Gøtu og Leirvík.

Allir bussarnir koyra heim aftur eftir dansin

Alt hetta stóra tiltakið verður á Kambsdali leygarkvøldið 21. februar.

SAMBANDSFLOKSINS




~~FØROYSKT FULLVELDI~~ »RÍKISEINDIN« SKAL IKKI SKALAST!
~~KVINNUR Í LANDSINS LEIÐSLU~~ BARA MENN SLEPPA AT STÝRA!
~~FØST BÚSKAPARSTÝRING~~ ÚTGJARING TIL KOMANDI ÆTTARLIÐ AT RINDA!
~~YVIRSKOT Á FÍGGJARLÓGINI~~ STÓRT UNDIRSKOT Á FÍGGJARLÓGINI!
~~FRÆLST VINNULÍV~~ POLITISKT STÝRD VINNA!
~~SAMHALDSFASTAR SOSIALAR SKIPANIR~~ SKATTALÆTTAR TIL TEY RÍKASTU!

Tað var útsøla á Gamla Apoteki. Fólkaflokkurin seldi seg sjálvan til Sambandsflokkin. Javnaðarflokkurin seldi seg sjálvan til Sambandsflokkin og Fólkaflokkin.
Men Sambandsflokkinum tørvaði ikki at selja seg til nakran. Hann fekk meira, enn hann nakrantíð hevði droymt um.
Úrslitið gjørdist, at føroyingar fingu eina breiða samgongu og nýggjan politikk. Vit kunnu hóskandi nevna tann nýggja politikkin "Sambandsfloksins ABC".
Hetta hevur við sær broytingar á øllum økjum í mun til tað, fullveldissamgongan stóð fyri.

Fullveldissamgongan vann valið so ruddiliga. Men kósin verður nú broytt, tí flokkar ikki longur vilja standa við sína egnu stevnuskrá.
Greiður sjálvstýrismeiriluti er á tingi. Tjóðveldisflokkurin fer at gera alt fyri, at sjálvstýrismeirilutin kann brúkast til at reka sjálvstýrispolitikk.
Greiður meiriluti átti eisini at verið á tingi fyri samhaldsføstum politikki. Tjóðveldisflokkurin fer miðvíst at leggja uppskot fram, ið kunnu skapa einar frælsar, rættvísar og javnar Føroyar fyri øll.

TJÓÐVELDISFLOKKURIN